**Til hoyringspartarnar**

Kunning í samband við hoyringsskriv:
**Lógaruppskotið um eftirlønaruppsparing og lógaruppskotið um skatt av eftirløn eru løgd saman til eitt samlað lógaruppskot.**

Upprunaliga var ætlanin at gera tvær lógir at skipa eftirlønarøki. Onnur lógin skuldi snúgva seg um bundna uppsparing, og hin lógin skuldi skipa skattaviðurskifti við inngjaldi til eftirlønauppsparing og útgjøldum av eftirlønaruppsparing.

Hesar báðar lógirnar eru nú lagdar saman til eina lóg. Orsøkin er, at nógv eins viðurskifti annars skuldu verið ásett í báðum lógunum. Broytingin ger, at samanlagda lógin verður lættari at nýta bæði hjá uppsparunum og eftirlønarveitarunum.

Parturin um eftirlønaruppsparing, nevniliga at øll skulu spara upp til egna eftirløn er viðgjørdur í politiska fylgibólkinum og er við í uppkotinum til semju sum politiski fylgibólkurin hevur gjørt.

Hinvegin verður gjørt vart við, at dagføringin og nýskipanin av skattligu viðurskiftunum viðvíkjandi inngjøldum og útgjøldum av eftirlønarskipanum ikki eru politiskt viðgjørdar enn, og eru tí ikki við í tí uppskotinum til semju, sum politiski fylgibólkurin er komin fram til.

Uppskotið um at dagføra og nýskipað eftirlønarskattaviðurskiftini verður tí við hesum á fyrsta sinni lagt fram til politiska viðgerð.

Við hesum telduposti verður *lóg um eftirlønaruppsparing og skatt av eftirløn* sent til hoyringar. Lógaruppskotið er ein partur av tí samlaðu pensjónsnýskipani, sum eru hesi lógaruppskotini niðanfyri í áður eru send til hoyringar:

Frá Fíggjarmálaráðnum:
- Uppskot til lóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti
- Uppskot til lóg um javning av fólkapensjón
- Uppskot til lóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt
- Uppskot til lóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin
- Uppskot til lóg um eftirlønaruppsparing og skatt av eftirløn

Frá Almannamálaráðnum:
- Uppskot til lóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a.
- Uppskot til lóg um broyting í løgtingslóg um almenna forsorg
- Uppskot til lóg um broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almennaveitingum
- Uppskot til lóg um broyting í løgtingslóg um uppihald á stovni o.l.
- Uppskot til lóg um broyting í løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl.

Øll lógaruppskot v.m. kunnu síggjast á heimasíðuni hjá Fíggjarmálaráðnum undir slóðini “pensjónsnýskipan”.

Hoyringssvar skulu vera Fíggjarmálaráðnum í hendi í seinasti lagi 1. september *2010.*
Spurningur og ivamál kunnu rættast til Fíggjarmálaráðið á telefon 35 20 20 ella teldupost <u>fmr@fmr.fo</u>